beinleiðis í rørið til motorin so hvørt hann brendi tað. Og hendan pøsin rakk til skipið kom í havn.

## Útróður í Grønlandi

Í 1930 og 1931 var Diurin við Standard. Skipari var Jákup við Á úr Porkeri. Hetta var ein stór skonnart, sum porkeningar áttu. Hon var so stór, at 1200 skippund sóust ikki aftur í henni.

Millum annað róðu teir út í Grønlandi við við einum 5-6 bátum, sum fleiri føroysk skip gjørdu tá í tíðini. Fiskaríið var gott, men prísurin var sera vánaligur, bert 10 oyru pundið. Hetta gav bert einar 300 krónur í avrokning, og var hetta sera lítið í mun til veiðuna.

Teir vóru seinir heim úr Grønlandi hetta heystið, og teir komu eisini í storm á Kappanum. Teir fingu ein slíkan sjógv, at kokkahúsið á dekkinum fór til sjós. Hetta gjørdist ein svangligur heimtúrur, nú teir illa fingu matgjørt.

Í 1934 sigldi Standard á ein boða á Norðurlandinum í Íslandi, og skipið varð vrak. Manningin varð bjargað.

## Upplivdi feigdarveðrið hjá Laura og Immanuel

Í 1932 var Diurin við Norðfarinum. Her upplivdi hann tiltikna illveðrið, tá ið Laura og Immanuel gingu burtur við tilsamans 38 monnum.

Norðfarið var tá á veg til Íslands. Teir fingu ein so stóran sjógv, at saltið var tveitt yvir í annað borðið , so skipið fekk slagsíðu. Í lastini var ein tóm krubba, og har stóðu allir spakarnir. Tóma krubban var nú fylt við salti, so fólkið mátti fara í lastina við tallerkum, pottalokum, fjalum og berum hondum fyri at fáa skipið á rættkjøl aftur. Tað vóru nógv skip, sum vóru illa kroyst í hesum veðrinum.

Diurin kendi fleiri av monnunum við hesum skipum. Tveir porkeningar vóru við Lauru. Hann kendi eisini fleiri menn við Immanuel. Hann hevði siglt saman við teimum við City of Norwich, har Gunnar Danielsen, ættaður úr Søldafirði, var skipari.

Spurningurin er um nakar annar er á lívi, sum hevur upplivað hetta illveður.

## Fingu ikki oyra fyri heilan túr

Í 1936 var Diurin við Honnu av Tvøroyri. Petur í Geilini var skipari. Á vegnum heim fingu teir illveður á Kappanum. Tá fingu teir ein so stóran sjógv, at lúkan fór av.



*Ragnhild og Diurin*



*Á Hamri á Skálavík haðani Ragnhild, kona Diin, var ættað*

Tíbetur var lastin so full av fiski, at sjógvurin ikki slapp í hana.

Sama ár var hann við Báradrangi. Men hetta gekk ikki væl. Tíðirnar vóru framvegis ringar, og reiðaríið fór á húsagang. Tá vóru fiskimenn ikki so væl tryggjaðir við sjópanti sum í dag. Tískil fingu teir ikki eitt oyra fyri túrin. Báradrangur var annars seinasti deyðsiglari á Tvøroyri.

## Nógvar vanlukkur

Diurin hevur livað stóran part av hesi tíðini, táið stórar vanlukkur hendu á sjónum. Hesar raktu meint, eisini í Porkeri.

Fyrst í mars mánaða 1910 fóru nógvar sluppur av Trongisvági út á Bankan. Tá ið tíðin var úti fyri vanligum túri, komu tær allar aftur í øllum góðum uttan Norðstjørnan hjá Mortensen. Leingi var bíðað, men um miðjan apríl gjørdist ræðuliga óvissan til ræðuliga vissu. Hildið varð, at hon var farin í tí ringa veðrinum, sum var á Bankanum 10. mars.

Við vóru 11 menn. Av hesum vóru níggju porkeningar. Johan Mortensen úti á Klova í Porkeri var skipari. Saman við honum fórust fýra brøður hansara og maður systir hansara, hann var úr Sumba. Harvið fórust seks mans so at siga úr sama húsi. 11. maðurin var úr Hovi.

Longu í 1914 hendi næsta stóra vanlukkan. Tá fórst Robert Miller. Hon fór av Havnini 13. mars. Hon skuldi undir Føroyar og helst á Bankan, men spurdist ikki aftur. Onnur føroysk skip, sum vóru á Bankanum, høvdu sæð hana og hildu, at hon 20. mars fór av Bankanum. Hon sigldi tá í ein útnyrðing ella norðan, og hildið var, at hon setti kós til Íslands. Eitt skip hevði sæð Robert Miller repa seglini um 20. mars vestan fyri Mykines.

24. og 25. mars var eitt rættiligt ódnarveður undir Íslandi og kunnu teir vera farnir tá. Skipari var tann bert 22 ára gamli John Danielsen, beiggi Danbjørg. Ein annar porkeningur var beiggi Diin, Petur Hans, sum bert var 15 ára gamal. Hetta var sjálvsagt ein stórur smeitur. Teir báðir vóru porkeningarnir við. Manningin var 11, og teir flestu vóru úr Sumba.

Undir krígnum fórust fleiri porkeningar á sjónum. Í 1940 gekk ein porkerisbátur, Búgvin, burtur við 8 monnum. Fleiri av hesum monnum vóru í ætt við teir, sum fórust við Norðstjørnini.

Tann 14. februar 1944 hvørvur báturin Louisa úr Porkeri við 4 monnum. Her var tað á sama hátt sum vanligt var við familjuskapi. Tveir av teimum vóru beiggjar, synir Johan, beiggja Dias á Heyggi, og hinir tveir vóru feðgar.

## Torvbáturin

Tann 22. juli 1952 hendir enn ein syrgilig vanlukka, hesa ferð við einum torvbáti. Porkeningar skóru torv í Nesi. Hagar var lagaligast at fara við báti. Hetta hevði altíð gingist væl. Hendan dagin var eisini av besta veðri. Teir høvdu fyrst verið eina ferð við fullum báti av torvi, og teir fóru avstað aftur eftir einum førningi afturat. Odmar, sonur Pola Poulsen, hevði verið við, og hann vildi eisini sleppa við næsta túrin, men pápin vildu ikki lovað honum við. Hetta dámdi honum sera illa. Men hetta bjargaði lívi hansara. Báturin kom nevniliga ikki aftur. Tá farið var at leita sást torv á sjónum, og teir hildu seg finna mastrina av honum. Nógvar gitingar vóru um, hvat ið kundi vera hent, um báturin var sigldur á ein flúr ella hann hevur verið órógvaður av eini brugdu. Líkið av Pola rak á land í Kirkjubø seinni. Poli var 39 ár, giftur við Evi hjá Dias á Heyggi og átti fýra børn. Jens Leo doyði frá konu og trimum børnum. Afturat teimum vóru tveir 17 og 15 ára gamlir dreingir við, Jon Poulsen og Herman Dam.

## Gjørdist handilsmaður og reiðari

Porkeri var ein fiskimannabygd burturav, har eisini nógvir skiparar vóru úr Porkeri. Ein røð av húsum í bygdini verður kallað »skipararekkjan«. Kendir skiparar vóru Lars, Johan og Dánjal Larsen í Gjørðum, Petur Mortensen í Geilini. Johan í Birginum, Mortan í Nøkrum, Jákup hjá Lærars, Petur Frederik, ættaður úr Funningi og aðrir.

Í 1937 yvirtók Diurin handilin hjá pápa sínum. Í 1938 giftist hann við ta javngomlu Ragnhild, dóttir Katrinu og Melchior Nicodemmusen í Skálavík. Ragnhild var ein stak røsk kvinna. Hon var dugnalig til hendurnar, og hon var eisini fróðarkvinna. Í 1979/81 bað Óluva Skaale hana skriva søgur til barnaútvarpið, og tað lá væl fyri. Hon doyði í 2001, 92 ára gomul.

Pápi Melchior var Demmus á Hamri. Hann plagdi at hýsa gamla Sloan, tá ið hann kom í oynna.

Í 1896 holvdist bátur úr Skálavík í Skálsáarbáruni. Báturin hevði verið norðuri við Áir eftir hvalatvøsti. Millum aðrar vóru Demmus og sonurin 24 ára gamli Melchior við. Melchior slapp uppá kjøl og fekk fatur í pápanum, men hann orkaði ikki at halda honum. At enda sigur pápin við sonin: "Bjarga tær sjálvum, lat meg fara, men síggj til at lata teg umvenda!" Tey gjørdust eisini grundarlagið fyri brøðrasamkomuna í Sandoynni í mong ár.

Melchior var framburðsmaður. Hann var dugnaligur til landbúnaðin og dugdi at fáa burtur úr øllum, eisini bjørgunum. Hann fekk sær vatnmyllu, sum lætti nógv um arbeiðið at mala kornið. Tað var dyrkað korn nógv longri í Sandoynni enn aðra staðni í Føroyum.

## Kvinnufall av nátasjúku

Umframt allar skipavanlukkurnar var 1937 eisini eitt syrgiligt ár í Porkeri, táið fimm ungar konur doyðu av havhestasjúkuni.

Tað var umleið 1930, at fólk varnaðust eina merkiliga sjúku, sum herjaði júst í september, og sum kostaði fleiri mannalív. Serliga vóru tað ungar kvinnur sum doyðu. Lækni í Vági var Arthur Rasmussen, seinni Vaag. Hann hevur greitt frá, at árini 1930-1938 doyðu 54 fólk við vissu av hesi sjúku. 40 av teimum vóru úr Suðuroy.

Í 1937 doyðu 11 fólk av havhestasjúkuni. Av hesum fimm í Porkeri. Hetta vóru kvinnur í aldrinum 22-38 ár. Tær doyðu 7., 17., 19., 30. september og 1. oktober. Hetta merkir, at tær eru allar deyðar innan 3-4 vikur.

Fleiri av teimum stóðu undir børu í senn. Ein sum doyði var Kristianna Sørensen, ættað úr Lorvík, kona Hans Paula undir Stígnum. Hans Pauli var burtur, og jarðarferðin var byrjað. Á kirkjugarðinum sær fylgið eitt skip kom inn eftir Vágsfirði. Tey síggja, at hetta er City og Norwich, sum Hans Pauli var við. Avrátt verður at steðgað við jarðarferðini. Tá City